


HAVSBRÚN

**Leikskrá nr.7**

FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TORSHAVN

Hósdagur 22. mai 2016

effo deildin

Mynd: Sigmar Mørkøre

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
ábyrgdarblaðstjóri



Vælkomin til Effodyst á Fløtugerði í Fuglafirði.

Í dag taka vit ímóti B36 úr Havn, sum vit hava hitt einaferð fyrr í ár, tá vit leiktu í Gundadali, og slapp árstalfelagið alt ov lætt avstað við trimum stigum, hetta ætla okkara menn at rætta uppá, men ongin sigur at tað er lætt, tí mótstøðu-liðið liggur á odda í deildini, og sær út til at klára støðuna væl við sera nógvum ungum leikarum, sum sleppa framat orsaka av nógvum skaðum millum teir roysndu leikarnar. Talan er enntá um at halda felags konfirmatión í B36-húsinum í heyst.
Okkara leikarar hava eitt tap móti grannunum uttanfyri Eiði í bagasjuni, og svíður hetta sera illa, eisini tá hugsa verður um mátan hetta hendi: 3-1 og í veruleikanum ongantíð spenningur í dystinum eftir at teir komu uppá 2-1 í fyrra hálvleiki eftir at vit fyrst høvdu lagt okkum á odda.
Okkara spælarar hava ikki fingið alt sjálvsálitið aftur enn, síðan Símun Pluss Jákup hava tikið yvir, men batar eru heilt víst at síggja og eru úrslitini heilt víst beint handan hornið, og er týdningarmikið hjá hópinum at halda høvdið kalt, tí at tað krevur hart arbeiði og áhaldni at fáa úrslit.

Koyrið á drongir.
Góðan dyst øll somul

*Birgir*

Í 2015 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 19-04-2015 | ÍF-B36 | 3-1 |
| 18 | 28-07-2015 | B36-ÍF | 4-0 |
| 27 | 03-10-2015 | ÍF-B36 | 1-3 |

Í 2014 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6 | 21-04-2014 | ÍF-B36 | 2-5 |
| 15 | 27-06-2014 | B36-ÍF | 1-0 |
| 24 | 01-10-2014 | ÍF-B36 | 1-2 |

Í 2013 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 8 | 28-04-2013 | B36-ÍF | 2-2 |
| 17 | 28-07-2013 | B36-ÍF | 1-2 |
| 27 | 26-10-2013 | ÍF-B36 | 1-3 |

Í 2012 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3 | 05-04-2012 | B36-ÍF | 1-1 |
| 10 | 28-05-2012 | ÍF-B36 | 1-1 |
| 20 | 19-08-2012 | B36-ÍF | 0-2 |

Í 2011 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4 | 25-04-2011 | B36-ÍF | 1-1 |
| 11 | 11-06-2011 | ÍF-B36 | 1-1 |
| 20 | 11-09-2011 | B36-ÍF | 3-0 |

Í 2010 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5 | 02-05-2010 | B36-ÍF | 1-1 |
| 14 | 27-06-2010 | ÍF-B36 | 0-5 |
| 24 | 26-09-2010 | B36-ÍF | 1-0 |

ÍF
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

LEIKSKRÁIN:
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: Hildur Høghamar



## Tippikapping

Aftur í ár fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á einum leikara, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur. Lutakast verður síðan ímillum teir seðlar, ið hava flest rætt svar. Drigið verður fyri hvønn triðja heimadyst, og verður vinnarin uppringdur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| 29/5/16 | B36-Skála | | | | |
| 29/5/16 | B68-TB | | | | |
| 29/5/16 | Víkingur-HB | | | | |
| 29/5/16 | KÍ-NSÍ | | | | |
| **29/5/16** | **AB-ÍF** | | | | |

Navn:

Telefonnummar





**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

NORÐOYA SPARIKASSI



www.ns.fo

Netbankin sum app
skanna kotuna

Ert tú lesandi í Føroyum ella uttanlands, er lætt at avgreiða fíggjarligu viðurskifti tíni í Norðoya Sparikassa.

Bílegg eitt ungdómsprát á tel. 47 5000

UNG 13-25 NemKonta Netbankin Gjaldkort Ráðgeving

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

Opnigstíðir:
Mána. - Fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

www.gassola.fo

Grein

# ÍF hevur eyðkendan stíl

Jákup Ósá



Mynd: Símun á Hovdanum

Tá eg sum klaksvíkingur bleiv spurdur um at siga nøkur orð um ÍF, nú felagið í ár fyllir 70 ár, so var lætt at siga ja. Norðoyingar og fuglfirðingar hava mær vitandi altíð havt gott samstarv og arbeiða væl saman. Tað síggja vit m.a. við øllum klaksvíkingunum í ÍF, deildini hjá Norðoya Sparikassa í Fuglafirði, uppisjóvarvirkinum Pelagos, har m.a. fuglfirðingar og klaksvíkingar samstarva, og einum fuglfirðingi á redaktiónini hjá Norðlýsinum :) Og sum eg skilji, so hildu flestu fuglfirðingar við KÍ í gamlari tíð, á ÍF ikki var umboðað í bestu deildini.

Vinarlagið millum Fuglafjørð og Klaksvíkina sást ikki minst aftur í fótbóltinum. Nógvir eru klaksvíkingarnir, sum hava spælt við ÍF og eisini eru fuglfirðingar væl umboðaðir í mun til, hvussu fáir føroyskir leikarar uttanífrá hava umboðað KÍ. Har kundu eg nevnt Símun Eliasen, Bárður á Lakjuni og Høgna Madsen. Og í ÍF hópinum í ár hava 7 leikarar spælt við KÍ antin í bestu deildini ella í ungdómsdeildum.

### ÍF sýnir posetivan hugburð til fótbóltin

Tá eg lýsi ÍF, so er tað fyrst og fremst grundað á mína tíð sum fótbóltsáhugaðir og tað røkkur aftur til umleið 1990. Tí vera 1979 legendurnar gloymdar í hesum samanhanginum. Tá eg hugsi ÍF, so er tað fyrst og fremst ein posetivur hugburður til fótbólt, sum kemur mær fyrst til hugs. ÍF er liðið, sum leggur dent á tekniska partin av fótbóltinum og sum hugsar álop áðrenn verju. Tað er nakað sum fótbólturin hevur brúk fyri og kanska onkuntíð saknar hjá summum liðum. Tað skal helst vera undirhald og álopsfótbóltur. Tað er bara at hyggja eftir málúrtøkuni seinastu 25 árini. Tað er sjáldan, at trupulleikin hjá ÍF ikki liggur í, at liðið letur ov nógv mál inn.

### Hava flutt seg rætta vegin

ÍF hevur ment seg í mínari tíð. Tí vit skulu bara aftur til 2007 fyri at finna seinast, tá ÍF var í næstbesta deildini. Áðrenn tað var liðið í nógv ár eitt elevator lið, sum skifti millum bestu og næstbestu deildina. Men seinnu árini hevur ÍF ment seg og var enntá árini 2010-2013 partur av oddinum í føroyskum fótbólti antin í landsella steypakapping. Síðani er liðið viknað nakað, men tó ikki so nógv, at tað nakrastaðni kemur uppá tal at tosa um niðurflyting. Í ár verður ÍF av teimum flestu mett at vera eitt lið, sum kann koma at stríðast um síðsta Europa League plássið. Men framgongdin frá at vera eitt elevator lið og til eitt støðugt lið í Effodeildini skal ikki undirmetast, tí ÍF er millum plássini í Føroyum av Effoliðunum, sum hava minst fólkargrundarlag til at røkka hesum.

### Loyalir fuglfirðingar

Fuglfirðingar brenna nógv fyri fótbóltinum og eru góðir við sítt felag. Tað sæst best aftur í, hvussu fáir fuglfirðingar spæla við øðrum feløgum enn ÍF. Hóast teir bestu uttan iva hava havt tilboð frá øðrum feløgum gjøgnum ár og dag, so velja teir at blíva í Fuglafirði. Áskoðararnir fylgja eisini ÍF tætt, hóast tað onkuntíð hevur verið langt millum "snapsirnar" hvat steypum og heiðursmerkjum viðvíkur. Tá ÍF var í steypafinalunum í Klaksvík í 2010 og 2011 sóu vit, hvussu ótrúligur stuðulin kann vera úr Fuglafirði, tá úrslitini eru góð. Eg vænti ikki klaksvíkingar gloyma, tá ein fullsettur Sam kom siglandi inneftir vágni við larmandi reyðum ÍF viðhaldsfólkum. Men óansæð úrslit, so eru Gutti, Andras, Mortan, Eliseus, Trygvi,

Framhald á síðu 18

# Tips 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Hvør spurningur gevur 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum. Ein leikari luttekur hvørja ferð, og spælir hann í móti einum, ið á ein ella annan hátt, hevur okkurt við ÍF at gera. Verður svarað skeivt uppá spurningar, sum beinleiðis hava við ÍF at gera, telur tað hálvt minusstig. Endar tað við javnleiki, verður eykaspurningur gjørdur, ið hevur eitt talvirði. Vinnarin er so viðkomandi, ið gitir nærmast rætta svarinum.

Aftaná at Heri hevði verið einaráðandi her, vísti tað seg, at Andy hóraði undan og vann ein tepran 5,5-5 sigur. Um tað var fyrimyndin Roberto Baggio, sum spældi inn, ella tað, at Heri ikki kennir sína ÍF søgu, skulu vit lata verða ósagt. Andy kemur so at dystast móti onkrum, ið á ein ella annan hátt hevur havt eitthvørt við ÍF at gera. Vit ynskja Andy tillukku við sigrinum, nú hann minkaði um munin og samlaða støðan nú er 6-1.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | AÓO | HHN |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hvør er toppskjútti fremstu hollendsku deildini? | Luuk de Jong | Arkadiusz Milik | Vincent Janssen | 0 | 1 |
| 2 | Hvør er liðskipari hjá Norwich? | Russel Martin | Jonny Howson | Graham Dorrans | 0 | 1 |
| 3 | 5. august í 1992 fær Óli Johannesen sína landsliðsdebut. Í móti hvørjum er dysturin? | San Marino | Ísrael | Malta | 1 | 0 |
| 4 | Í hvørjum felagi endaði Stan Collymore sína yrkisleið? | Real Oviedo | Malaga | Real Betis | 1 | 1 |
| 5 | Hvussu nógvar dystir hevur Kaj Ennigarð spælt fyri ÍF? | 20 | 25 | 30 | 1 | -0.5 |
| 6 | Hvat av hesum feløgum hevur Jesper Grønkjær IKKI umboðað? | Birmingham | AaB | Hertha Berlin | 0 | 1 |
| 7 | Hvar byrjaði Antonio di Natale sína yrkisleið? | Salernitana | Empoli | Sampdoria | 0 | 1 |
| 8 | Hvørjum blusunummari spælir Thomas Vermaelen við, tá hann umboðar FC Barcelona? | 23 | 24 | 25 | 0 | 0 |
| 9 | Hvør av hesum hevur fingið flest gul kort fyri besta liðið hjá ÍF? | Roy Róin | Jonn Thomsen | Símun Eliasen | 1 | -0.5 |
| 10 | Hvør var einasti leikari hjá Italia, ið kom á All-Star liðið í HM 1994? | Roberto Baggio | Paolo Maldini | Gianluca Pagliuca | 1 | 0 |
| 11 | Hvør av hesum dómarum er yngstur? | Petur Reinert | Dagfinn Forná | Eiler Rasmussen | 0 | 0 |
| 12 | Í móti hvørjum hevði Manchester United spælt, tá flogvanlukkan í Munchen 6. februar 1958 hendi? | 1860 Munchen | Partizan Beograd | Red Star Beograd | 1 | 0 |
| 13 | Í móti hvørjum fekk Leivur Joensen sín fyrsta dyst í Effodeildini? | 07 Vestur | AB | EB/Streymi | -0.5 | 1 |
| | | | | | 5,5 | 5,0 |

Rætt svar: 2 – 1 – X – 1 – X – 2 – X – 1 – 2 – 1 – X – 2 – X




**Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.**

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**

usedbaader.biz

## BAADER service OG SMIÐJUARBEIÐI

Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.

Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfríum tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.

Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.

BAADER · Tomaco · Ubro SystemPac · euskan++

Tel 775 775
www.pl.fo

peturlarsen





## CAPTO TIL FLÓTITROL

RÆTTILIGA FANGANDI

**CAPTO** er ein nýggjur nettráður til flótitrol sum **VÓNIN** hevur ment.
Set teg í samband við okkum fyri at hoyra meira. Sí www.vonin.com

VÓNIN®




Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179



Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið

SK
SVENDKROSSTEIN

Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo

# Hagtøl

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 21/5/16 | Skála-Víkingur |
| 22/5/16 | B68-AB |
| 22/5/16 | KÍ-TB |
| **22/5/16** | **ÍF-B36** |
| 22/5/16 | HB-NSÍ |

## KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 29/5/16 | B36-Skála |
| 29/5/16 | B68-TB |
| 29/5/16 | Víkingur-HB |
| 29/5/16 | KÍ-NSÍ |
| **29/5/16** | **AB-ÍF** |

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Klæmint A. Olsen | 12 | NSÍ |
| Páll A. Klettskarð | 8 | KÍ |
| Jóannes Bjartalíð | 7 | KÍ |
| Filip Djordjevic | 6 | Vík. |
| Róaldur Jakobsen | 6 | B36 |
| **Adeshina A. Lawal** | **5** | **ÍF** |
| Jógvan Andrias Nolsøe | 5 | B36 |
| Sølvi Vatnhamar | 5 | Vík. |
| Árni Frederiksberg | 4 | NSÍ |
| Sebastian Pingel | 4 | B36 |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | Mál |
|---|---|
| Adeshina A. Lawal | 5 |
| Clayton Soares do N. | 3 |
| Bogi Reinert Petersen | 3 |
| Andy Ó. Olsen | 2 |
| Dánjal á Lakjuni | 1 |
| Poul N. Mikkelsen | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 11 | 7 | 2 | 2 | 23 | 12 | +11 | 23 |
| 2 | KÍ | 11 | 7 | 2 | 2 | 20 | 10 | +10 | 23 |
| 3 | Víkingur | 11 | 6 | 4 | 1 | 24 | 13 | +11 | 22 |
| 4 | NSÍ | 11 | 7 | 0 | 4 | 25 | 13 | +12 | 21 |
| 5 | HB | 11 | 5 | 3 | 3 | 16 | 12 | +4 | 18 |
| **6** | **ÍF** | **11** | **4** | **2** | **5** | **17** | **26** | **-9** | **14** |
| 7 | Skála | 11 | 2 | 3 | 6 | 9 | 16 | -7 | 9 |
| 8 | TB | 11 | 2 | 3 | 6 | 8 | 17 | -9 | 9 |
| 9 | AB | 11 | 1 | 5 | 5 | 11 | 15 | -4 | 8 |
| 10 | B68 | 11 | 0 | 4 | 7 | 8 | 27 | -19 | 4 |

# Liðini í dag

| | ÍF | |
|---|---|---|
| 1 | Andrias Poulsen | |
| 2 | Gunnar Christiansen | |
| 3 | Poul N. Mikkelsen | |
| 4 | Alex Jose dos Santos | |
| 5 | John Daniel Guðjónsson | |
| 6 | Karl A. Løkin | |
| 7 | Dánjal á Lakjuni | |
| 8 | Bogi R. Petersen | |
| 9 | Kristoffur Jakobsen | |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard | |
| 13 | Hallgrím G. Hansen | (M) |
| 14 | Dánjal Pauli Højgaard | |
| 15 | Oliver Korch | (M) |
| 17 | Leivur Joensen | |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento | |
| 23 | Andy Ó. Olsen | |
| 27 | Margeir Toftegaard | |
| 28 | Hanus Eliasen | |
| 30 | Adeshina A. Lawal | |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard | (L) |
| 80 | Tóri T. Traðará | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari | Jákup Mikkelsen |
| Venjari | Símun Eliasen |
| Liðleiðari | Ólavur Larsen |
| Liðleiðari | Trúgvi Nesá |
| Liðleiðari | Dan Petersen |

| | B36 | |
|---|---|---|
| 1 | Tórður Thomsen | (M) |
| 2 | Andrias H. Eriksen | |
| 3 | Jónas Þ. Næs | |
| 4 | Robert Heðin Brockie | |
| 6 | Høgni Madsen | |
| 7 | Alex Mellemgaard | |
| 8 | Hørdur Askham | |
| 9 | Jákup á Borg | (L) |
| 10 | Róaldur Jakobsen | |
| 11 | Lukasz Cislewiz | |
| 13 | Gestur B. Dam | |
| 14 | Pætur Petersen | |
| 15 | Hannes Agnarsson | |
| 16 | Bjarni Petersen | |
| 18 | Benjamin Heinesen | |
| 20 | Høgni Eysturoy | |
| 21 | Rói M. Hentze | (M) |
| 22 | Sebastian Pingel | |
| 23 | Jógvan Skeel Nolsøe | |
| 24 | Hanus Thorleifsson | |
| 25 | Trygvi Askham | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari | Eyðun Klakstein |
| Hjálparvenjari | Jákup á Borg |
| Liðleiðari | Jens Kristian Hansen |
| Liðleiðari | Johnny Samuelsen |
| Liðleiðari | Kári Johannesen |
| Liðleiðari | Fróði Clementsen |

Bóltstuðul er Fagranes

Dómari: Kári á Høvdanum
Hjálpardómarar: Jan á Líðarenda Andreas Josephsen
4. dómari: Alex Troleis
Eygleiðari: Tummas


sponsored
by
INTERSPORT
Thomas Dam ítróttur


Leiðandi reiðarí
í norðurhøvum
Finnur Fríði
Jupiter
Tummas T
Saksaberg
VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tlf: 610600
Faks: 441650 | vardin@vardin.fo | www.vardin.fo


pls.fo
SPORA BILIN
OG FÁ GLEÐI AV FYRIMUNUNUM
1. Minni slit av dekkunum
2. Lægri brennievnisnýtslu
3. Høgligari túrar
UPPMÁTING PR. AKSIL U/MVG 475,-
SPORING EFTIR AVTALU
RING 765 765
OG AVTALA TÍÐ
pl stórbilar
verkstaður & søla
Tel 765 765 · www.pls.fo

VEST PACK
...meira enn pakkitilfar!

- Arbeiðsklæðir
- Kjølsvín
- Balliplast
- Oljusperringar
- Pakkimaskinur
- og meira afturat

Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitari av pakkitilfari og tí, sum fylgir í kjalarvørrinum av tí - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg, pakkimaskinur osv.

Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av tí, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin viða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat viðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent - eisini framleiðslan.

FO-350 Vestmanna · Faroe Islands · Telefon +298 42 41 07 · www.vestpack.fo

Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**



Ætlar tú at selja tíni hús í Fuglafirði ?

- vit hava keyparar, ið bíða

Niels Finsensgøta 37
Tórshavn | Tel 348 900
inni@inni.fo | inni.fo

INNI

**Vitja handil okkara á Hjalla**

Her fær tú alt innan vask og reingerð á einum stað



**KEMILUX**
www.kemilux.fo



Framhald av síðu 7

Martin, Janus, Bogi og co. altíð at síggja uppi á vegnum. Loyalir áskoðarar, sum fylgja liðnum í viðgongd og mótgongd :)

**Vóru »besta« liðið í 2012**

Besta ÍF liðið í mínari tíð var í 2012. Eg minnist, at eg kanska var tann einasti, sum alment setti ÍF so høgt á stigatalvuni undan kappingarárinum. Eg metti ÍF at enda á 2. plássi, har liðið eisini endaði. Men eingin ivi um, at meistaraheitið skuldi verið komið til Fuglafjarðar hatta árið, tí ÍF hevði eftir mínum tykki besta liðið, hópin og besta spælið. Men á Svangaskarði var tað stong út í triðsíðsta umfarinum og helst manglandi vinnararoyndir, ið gjørdu at ÍF bleiv ov stutt. Men tað liðið hevði alt. Royndar og sterkar leikarar í Jákup Mikkelsen, Bartal Eliasen og Høgna Madsen umframt leikarar sum kundu nógv við einum bólti sum eitt nú Jan Ó. Ellingsgaard, Boga Løkin, Dánjal á Lakjuni, Thomas Asmussen, Simon Skibsted og Clayton Soares.

**Menna ungdómspartin**

Skal eg koma við nøkrum kritikk punkti, so hevur tilgongdin av fuglfirðingum úr egnum rekkjum ikki verið nóg góð seinastu árini. Tað ger, at flestu dystirnar eru ikki meir enn 3-4 uppruna ÍF leikarar í uppstillingini. Og tá er orsøkin ikki, at nógvir uppruna ÍF leikarar spæla í øðrum feløgum, tí har telji eg bara tveir. Men tá eg leiti mær inn á if.fo og hyggi eftir, hvørjir venjarar ÍF hevur á ungdómssíðuni í ár, so sær út til, at felagið hevur uppraðfest hendan partin, og tað er gleðiligt og fer mest sannlíkt at geva úrslit um nøkur ár. ÍF fer neyvan nakrantíð at klára at standa seg millum tey bestu við bara lokalum fólki, tí til tað er fólkagrundarlagið ov lítið, men tilgongdin av egnum leikarum skal gerast meira støðug enn hesi seinastu árini.

**Til tíðir í toppinum**

ÍF hevur stabiliserað seg í bestu deildini seinastu árini, og eg haldi, at eg tosi fyri tey flestu, tá eg sigi, at ÍF eigur eitt sjálvsagt pláss í bestu deildini, har vit eisini sóu so seint sum árini 2010-2013, at við røttum og hørðum arbeiði er pláss fyri ÍF ímillum tey bestu eisini av og á, hóast fólkagrundarlagið ger tað trupult at halda seg støðugt í toppstríðnum.

Fuglfirðingar eru lokalir, loyalir og tíma best at spæla tekniskan álopsfótbólt. Tað gevur ÍF ein serligan eyðkendan stíl, sum einki annað felag hevur. Og við hesum stílinum hevur ÍF ment seg frá at vera eitt elevator lið til at vera eitt støðugt lið, sum á hvørjum ári spælir í bestu deildini. Eg haldi eisini, at øll eru góð við ÍF :)

Hjartaliga til lukku við teimum 70 árunum øll kring ÍF!

*Jákup Ósá*
*Ítróttarskrivari á Norðlýsinum*





Ein TRYGG rýmingarleið





Í húsum við fleiri hæddum sova vit ofta á loftinum. Kyknar eldur, kann tað gerast ógjørligt at flýggja. Í slíkum førum er tann kollveltandi MODUM brandstigin ein trygg loysn og samstundis tín einasti útvegur.

Hann er heftur uttan á húsini og nærum ósjónligur, tá ið hann er lagdur saman. Í neyðstøðu verður hann lættliga latin upp, so tú skjótt og trygt kanst ganga niður.

Fæst í øllum longdum. Vit átaka okkum uppseting.

Fønix

Mykinesgøta 8 - 100 Tórshavn - Tel +298 311909



Jógvan Weihe
Stiðjagøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tel. 35 38 97 · Fax 35 38 98

Salong Halda.fo
Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:
Mánadag 9.00 - 17.00
Týsdag 9.00 - 19.00
Mikudag 9.00 - 19.00
Hósdag 9.00 - 18.00
Fríggjadag 9.00 - 17.00
Leygardag 9.00 - 13.00
Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo
Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo
510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo




KSS
GER SJÓLÍVIÐ LÆTTARI
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ
Kósaskákið 3 FO-700 Klaksvík Tel. +298 472030 Fax: +298 472031 T-postur: kss@kss.fo www.kss.fo

## 5 beiggja pør á besta liðnum

| Nøvn | Dystir fyri ÍF | Mál fyri ÍF |
|---|---|---|
| Jan og Ari Ó.Ellingsgaard | 409 | 56 |
| Eyðolvur og Áslakur R. Petersen | 407 | 80 |
| Hanus og Símun Eliasen | 364 | 84 |
| Høgni og Bárður á Lakjuni | 358 | 129 |
| Jonn og Mortan S. Thomsen | 313 | 43 |

## ÍF' arin



| | |
|---|---|
| Navn: | Dania Serafia Andrasdóttir Olsen |
| Føðingardagur: | 21.07.1995 |
| Føðistað: | Tórshavn |
| Starv: | Gangi í 3.g í Miðnámsskúlanum á Kambsdali |
| Pláss á vøllinum: | Áleypari |
| 3 orð sum lýsa teg: | treisk, málrættað og sjálvsikkur |
| Torførasti mótstøðumaður: | Heidi Sevdal |
| Frítíðarítriv: | Fótbóltur |
| Vónir fyri 2016: | Vóni at vit náa tey mál, vit hava sett okkum fyri kappingaárið 2016 |

## Tín Ítrótt:

| | |
|---|---|
| Fyrsti dystur á 1.liðið: | 01.04.2012 |
| Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: | 05.05.2013 |
| Minningarríkasti dystur: | Tá eg skoraði avgerandi málið í hálvfinaluni, sum gjørdi at vit komu í steypafinaluna. |
| Størstu fótbóltsliga ávirkan: | Beiggi mín, Klæmint Andrasson Olsen |

Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt: Badminton ella hondbólt
Hvat slag av venjing dámar tær best: Venjingar við nógvum avslutningum uppá mál
Hvat slag av venjing dámar tær ikki: Venjing uttan bólt

## Tínir favorittar:

| | |
|---|---|
| Matur og drekka: | Góðan føroyskan mat og mjólk |
| Slag av tónleiki: | Mær dámar so at siga allan tónleik |
| Sjónvarpssending: | 3-2 |
| Troyggja nr.: | 13 |
| Besti fótbóltsleikari nakrantíð: | Lionel Messi |
| Sjónvarp/filmstjørna : | Leonardo Dicaprio |
| Besta bók/blað : | BROT |
| Stuttligasti persónur: | Jákup Veyhe |
| Stuttligasti í hópinum: | Inga Maria Janusardóttir |
| Besti ÍF áskoðari: | Sigrid Petersen |

## Leikarafakta:

- Systir Klæmint A. Olsen, sum dugir væl at fáa ÍF fjepparar í ringum lag
- Íðin brúkari av Instagram
- Er úr Rituvík, men hevur ongantíð leikt ein dyst fyri NSÍ, í bestu deildini
- Fær studenta húgvuna í summar
- Toppskjútti á liðnum
- Verður av sínum viðleikarum krúna sum tann stuttligasta á liðnum


Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

VØRDSLAN
WEARHOUSE
"...klæðir og skógvar til hennara hansara og børnini, nú alt undir somu lon"





